# Ung lívsvirði í stavum, tølum og talvum

*Forvitnislig bók og kanning varð í gjár løgd fram. Hon snýr seg um lívsvirðini hjá ungum í Íslandi, Grønlandi og í Føroyum*

DAGFINN OLSEN

Eftir áheitan frá Útnorðurráðnum, hevur Sosialvidenskabeligt Institut við Islands Universitet gjørt eina kanning av, hvørji lívsvirði, tey ungu í Íslandi, Grønlandi og Føroyum leggja dent á í dag. Kanningin er komin í áhugaverdum bóklingi, ið var lagdur fram í gjár.

Kanningin byggir á sera umfatandi spurnarbløð, sum ung í londunum hava svarað.

Bókin er áhugaverd og gevur greiða vitan í stavum, tølum og talvum.

Høvuðsyvirskriftirnar eru Lívsáskoðan, Politikkur og tjóðskaparspurningar, Familjan, Gerandisdagurin, Trivnaður og metan av umstøðunum, Religión og etikkur og Framtíðarætlanir.

Nakrar av undiryvirskriftunum undir hesum evnum eru t.d. viðvíkjandi økonomiskum spurningum, um metan av hjúnalagnum, virðing og trúskapur, økonomiskir fyrimunir og kynsligt samlív, meting av ymsum samfelagsbólkum, so sum fólk úr øðrum londum sum grannar, evnismisnýtarar sum grannar og eisini verður komið inn á religión, tað at trúgva og at vera virkin á økinum.

Samanumtikið ein sera áhugaverd kanning, ið sigur rættiliga nógv um tey ungu í teimum trimum londunum í dag.

Sjálvsagt er eisini áhugavert at bera londini saman hvørt við annað.

Óivað hent hjá teimum, ið kunnu hugsast at gera nýtslu av slíkum tølum og sera áhugaverdur lesnaður hjá privatpersónum við áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og hjá foreldrum, ið hava børn, ið eru ung í dag.

Vegna Sosialvidenskabeligt Institut vid Islands Universitet, eru tað Fríðrik H. Jónsson, Hrefna Guðmundsdóttir og Karl Sigurðsson, ið hava staðið fyri kanningini.




*Eftir áheitan frá Útnorðurráðnum, hevur Sosialvidenskabeligt Institut við Islands Universitet gjørt eina kanning av, hvørji lívsvirði, teu ungu í Íslandi, Grønlandi og Føroyum leggja dent á í dag*



# Marknagilsvegurin verður dagførdur

*Í longri tíð hevur Marknagilsvegurin í Havn verið eitt stórt byggipláss og ikki ein av lívsæðrunum í býnum, sum hann plagdi at vera. Men nú sæst brátt endi á arbeiðinum, so ferðslutrýstið kann minkast í Miðbýnum. Koyrandi verður væntandi 1. desember í ár, sigur Leivur Hansen*

DAGFINN OLSEN

Marknagilvegurin lá fyrr nakað omanfyri Havnina. Síðani gjørdist hann alt meira partur av vanliga vegakervinum, sum ferðslutrýstið vaks.

Í longri tíð hevur henda týdningarmikla lívsæðr, tá um ferðslu ræður, verið tikin úr vanliga kervinum, tí arbeitt hevur verið við at dagføra vegin og skoyta hann í Ringvegin, ið liggur runt Havnina.

Hugskotið við hesum veg kring býin er at taka nakað av trýstinum av ferðsluni í miðbýnum.

Í meðan arbeitt hevur verið uppá Marknagilsvegin, hevur hann av og á verið heilt stongdur. Hetta hevur ført alla ferðsluna oman í býin, har mangan hevur verið trongt og ruðuleikakent, nú nógv virksemi er í landinum og eina mest í miðstaðarøkinum og høvuðsstaðnum.

Men nú er ein glotti fyri framman hjá teimum, ið sleppa skjótari fram við at nýta Ringvegin, Marknagilsvegin. Ella hjá teimum, ið mugu í gjøgnum miðbýin í bili, ella á annan hátt.

Marknagilsvegurin verður brátt liðugur og sostatt nýtist bert teimum, ið avgjørt mugu oman í býin, at fara tann vegin. Hjá øðrum liggur helst væl fyri at taka annan veg, t.d. nýggja og breiða Marknagilsvegin.

## Koyrandi í ár

Býráðsformaðurin í Havn, Leivur Hansen, sigur, at væntandi verður koyrandi eftir Marknagilsvegnum í ár. Tó kemur arbeiðið við at gera síðuvegir og annað at halda fram meginpartin av komandi árinum.

Arbeiði byrjaði í 1996 og er partur av Ringvegsætlanini.

Leivur Hansen sigur, at ætlanin var at leggja Ringvegin suður um Landssjúkrahúsið og knýta í vegin, ið gongur oman á Skipasmiðjuna. Man har komu friðingarmyndugleikar uppí.

Nú verður arbeitt við øðrum loysnum og t.d. eru ætlanir um at taka burtur nøsina, ið er til stóran ampa fyri ferðsluna úti við Landssjúkrahúsið og Sandagerð.

## Niðan á Hamaran

Tá arbeiðið uppá Marknagilsvegin er liðugt einaferð komandi ár, verður væntandi farið undir at gera vegin niðan á Hamaran á Argjum.

Rundkoyring skal gerast, har Marknagilsvegurin og Velbastaðvegur hittast. Síðani skal vegur gerast yvirum, við kirkjugarðin, og skal so knýtast í vegin niðan á Hamaran. Sum er, má koyrast inn í túnið hjá Fíggjarmálastýrinum, fyri at sleppa niðan á Hamaran, og viðmerkir Leivur Hansen, at hetta er ikki haldgóð loysn.

Men hann væntar, at hetta verður loyst, tá arbeiðið uppá Marknagilsvegin er liðugt komandi ár.

***Myndir: Jens Kristian Vang***





# Neyðin er stór

*Tørvurin á sosialari umsorgan í landinum er rættiliga stórur. Serliga í høvuðsstaðnum. Og hóast nógv verður gjørt av sjálvbodnum felagsskapum, er nógv, sum ikki verður rokkið. Pengarnir avmarka hjálpina*



*Á landsstevnuni hjá Bláa Krossi Føroyum, helt leiðarin á einum forsorgarheimi í Herning, Søren Boe, fyrilestur ( Mynd: Sveinur Tróndarson)*

EDVARD JOENSEN

Tað verður gjørt ov lítið fyri tey, sum detta niður í millum í samfelagnum. Ikki tí at viljin manglar, men tað gera pengarnir, sigur Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari í Bláa Krossi í Føroyum, sum hevði landsstevnu á Strondum seinasta vikuskifti.

Á landsstevnuni vóru ymsir fyrilestrahaldarar. Eitt nú Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sum segði seg gleðast um tað arbeiðið, felagsskapir sum Blá Kross gera.

Nevnt varð eisini, at eitt alment fyribyrgingarráð er á veg, sum skal koma í staðin fyri Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.

Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini helt eisini fyrilestur á landsstevnuni. Hon tosaði um samstarv millum felagsskap og forsorg. Eitt nú um tað kundi borið til at latið fólk, sum er undir kriminalforsorgini, til dømis gjørt samfelagstænastu hjá Bláa Krossi.

## Stórur trupulleiki

Ein annar fyrilestrahaldari var danin Søren Boe, sum er fyristøðumaður á einum forsorgarheimi hjá Blå Kors í Herning.

Hann greiddi frá tí arbeiði og teimum royndum, tey hava á forsorgarheimum í Danmark. Og hóast Blái Krossur í Føroyum einki heim hevur av júst hesum slagnum, er nógv, sum líkist her hjá okkum, sigur Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari hjá Bláa Krossi.

Blái Krossur hevur ein búfelagsskap í Kongagøtu í Havn, har heimleys fólk búgva. Ein er í Grønulíð, sum er beinleiðis knýttur at Blákrossheiminum í Lynggøtu.

Ásbjørn Jacobsen ger vart við, at Blái Krossur Føroyar og Blákrossheimið eru skild hvør frá øðrum soleiðis, at tey hava hvønn sín roknskap.

Hóast Blái Krossur, eins og aðrir privatir felagsskapir, ger eitt stórt sosialt arbeiði, verður alla tíðina onkur, sum ikki sleppur upp í part, tí tørvurin og neyðin í landinum eru nógv størri, enn tey flestu geva sær far um, sigur aðalskrivarin í Bláa Krossi. Hann sigur, at tað eru bara pengarnir, sum avmarka virksemið hjá hesum felagsskapum.

## Tungt at fíggja

Fíggjarligi stuðulin, Blái Krossur fær frá tí almenna, er ein kvart millión árliga. Og tað røkkur ikki serliga langt til tað arbeiðið, gjørt verður. So sjálvandi koma eisini pengar aðrastaðni frá. Ymiskt tiltøk, leiguinntøka frá teimum, sum búgva í búfelagsskapinum og limagjald til dømis. Blái Krossur Føroyar hevur 1.100 limir.

Tørvurin á sosialari hjálp í Føroyum er stórur, og Ásbjørn Jacobsen sigur, at serliga í Havnini stendur illa til. Tað sæst týðuliga á teimum vitjanum, sum eitt nú kaféin hjá Bláa Krossi, Blákrosstovan, fær. Í mars mánaða vitjaðu í meðal 31 fólk um dagin kaféina, teir dagar, hon var opin. Tí kundi leiðslan eisini ynskt ein ávísan stuðul frá Tórshavnar Kommunu. Men haðani kemur einki. Tá kaféin lat upp, gav Tórshavnar Kommuna tó Bláa Krossi 50.000 krónur sum íløgustuðul. Og tað er eingin loyna, at fáast ikki betri fíggjarligar umstøður, er vandi fyri, at neyðugt verður at stongja kaféina, sigur aðalskrivarin hjá Bláa Krossi, Ásbjørn Jacobsen.

Kaféin Blákrosstovan er eitt stað, har fólk koma at søkja sær sosiala samveru, tosa við onkran, sum kann hjálpa teimum, kanska fáa antabus og so framvegis. Stórur partur av teimum, sum koma har, eru fólk, sum á einhvønn hátt eru komin tvørt fyri av rúsevnismisnýtslu. Hetta eru fólk í øllum aldri og av báðum kynum, sigur Ásbjørn Jacobsen. Tó eru tað mest menn, sum vitja.

Eisini koma nógv avvarðandi umframt onnur, sum bara støkka inn á gólvið. Opið er mánadag til fríggjadag frá klokkan 14 seinnapart til klokkan 22 á kvøldi.

Blákrosstovan liggur í Kongagøtu í Havn við síðuna av Blákrossbúðini, sum selur brúkt klæði.

## Gamal felagsskapur

Blái Krossur er altjóða felagsskapur, sum varð stovnaður av sveisiska prestinum Louis-Lucien Rochat í 1877. Eftir at hava sæð neyðina, rúsdrekka hevði við sær, kendi hann seg kallaðan at byrja hjálpararbeiði fyri hesi fólkini. Í dag er Blái Krossur í 40 londum í Europa og Afrika.

Í endamálsorðingini stendur soleiðis:

Blái Krossur Føroyar hevur til endamáls við Guds og Hansara orðs hjálp

-at hjálpa menniskjum, ið eru illa stød av rúsdrekkaávum

-at fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni

-at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi

-at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

Blái Krossur er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum setur limum sínum ta treyt, at tey skulu vera avhaldandi.

Í Føroyum ger felagsskapurin tað, at ferðast verður runt til skúlarnar, har næmingarnir fáa møguleikan at gera sonevndar rúsfríar avtalur. Avtalan er, at ungdómurin bindur seg til at vera rúsfrían í eitt ár í senn. Í løtuni eru 600 ungdómar, sum hava skrivað undir hesa avtaluna, sigur Ásbjørn Jacobsen.

Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari hjá Bláa Krossi, sigur, at tað kann gott vera, at Blái Krossur ikki hevur marknaðarført seg nóg væl sum ein hjálparfelagsskap. Fólk seta mest felagsskapin í samband við fráhaldssakina sum so og hugsa ikki um tað hjálpararbeiðið, felagsskapurin ger.

Tað starvast fýra fólk fast hjá Bláa Krossi Føroyum. Høvuðsskrivstovan er á Glyvrum, har tey trý halda til. Ein teirra ferðast tó fast út á skúlarnar at geiða frá um rúsfríu avtaluna. Fjórða starvsfólkið er leiðarin á kaféini Blákrosstovuni í Havn.

KPMG

## Roknskaparleiðari

Fyri P/F Svend Krosstein søkja vit eftir einum roknskaparleiðara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**

Roknskaparleiðarin, sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran, hevur ábyrgdina av teimum roknskaparligu viðurskiftunum hjá felagnum so sum

- at leiða og skipa dagliga arbeiðið í bókhaldi felagsins og tryggja, at bókhaldið støðugt er dagført
- debitorrøkt
- gjalding av ognarum
- mvg-uppgerðum felagsins
- ársroknskapi felagsins

Harumframt skal roknskaparleiðarin verða við til at viðlíkahalda og dagføra dagligu mannagongdir felagsins.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt spennandi og avbjóðandi framtíðarstarv.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til bókhald og roknskap
- er vanur at arbeiða við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu

**Umsóknin**

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til

KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 22. mai 2000.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

***P/F Svend Krosstein rekur heilsølu við VHS-vørum v.m. umframt at felagið eisini hevur smásølu í handlinum uppi á Hálsi í Tórhavn. Harumframt eigur felagið fleiri bygningar, sum verða leigaðir út.***

***Hjá felagnum starvast í løtuni 17 fólk. Av hesum starvast 2 í bókhaldinum umframt roknskaparleiðaran.***

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34,
Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

team 85 • 31 65 11